

- Á Fish Fair fara tey á Vikmar at vísa, hvussu tað kann gerast nógv lættari og bíligari hjá sjófólki at fylgja við í tí, sum fyriferst harheima og teir vísa eisini eina skipan, sum bøtir munandi um trygdina á sjónum

# Nógv lættari og nógv bíligari

**Á Vikmar brúka tey framkomna tøkni til at gera tað lættari, bíligari og tryggari hjá fiskiflotanum**

Hjá øllum sjófólki er tað ein stórur saknur, at tað kann vera so tvørligt at hava samband við tey harheima, at teir fáa ikki rættiliga fylgt við í tí, sum fyriferst á landi.

Men tøknin batnar alla tíðina og á Vikmar leggja tey stóran dent á at brúka hesa tøknina til at lætta um umstøðurnar hjá okkara sjófólki.

Vikmar útvegar alla nautiska útgerð til skip. Men á Fish Fair hesuferð fara teir serstakliga á leggja dent á vísa, hvussu tað kann gerast bæði nógv lættari og nógv bíligari at samskifta ímillum skip og tey harheima.

Í samstarvi við Føroya Tele er Vikmar farin at bjóða skipum bæði breiðband og IP-telefoni.

Hetta gevur skipunum upp til tvey MB-download umborð, men harumframt fáa tey IP-telefoni, sigur Jan Egholm á Vikmar.

- Breiðbandið gevur skipunum skjótt internet umborð og IP telefoni gevur teimum sera bíligt telefonsamband. Við IP-telefoni, fáa skipini vanlig, føroysk telefonnummur umborð og kunnu tosa fyri vanligan telefontakst, sum vit hava á landi.

Jan Egholm sigur, at hetta er við til at javntseta fiskimenn við okkum á landi og gevur teimum nógv betri møguleika fyri at fylgja við í tí, sum fyriferst herheima.

- Við hesum tilboðum, kunnu sjómenn taka sína egnu farteldu við til skips og samskifta við tey herheima umvegis teldupost, ella teir kunnu tosa heim fyri lítið og lætt.

Men tað er eisini ein ógvuliga stór sparing í hesum, tí tað er sera dýrt at tosa umvegis fylgisvein og tí fáa sjófólk heilt aðrar møguleikar at tosa heim.

Jan sigur, at nøkur skip hava longu fingið hesar hentleikar umborð, men tað tykist sum um at rættilig fer við at koma á, tí á Vikmar hava tey rættiliga nógvar bíleggingar.

## Tryggari og hentari

Á Fish Fair í ár hevur Vikmar eisini eitt tilboð, sum økir munandi um trygdina á sjónum.

- Vit eru teir einastu í Føroyum, sum kunnu bjóða skipum AIS-net, sigur Jan Egholm.

AIS stendur fyri "Automatic Indentification System".

Hjá summum skipum er tað eitt lógarkrav, at hendan skipanin er umborð, men onnur skip hava fingið sær eina slíka skipan, at sínum eintingum.

Tað verður eisini meiri og meiri vanligt, at strandalond krevja, at skip, sum sigla í teirra sjóøki, hava AIS umborð fyri at forða fyri vanlukkum og fyri at bøta um trygdina, sum heild.

Fyrimunurin er, at við AIS-netinum ber tað til at síggja skip nógv longri burturi enn við vanligum radara.

- Við hesi AIS skipanini síggjast skip einar 20 fjórðingar burtur. Men harafturat er skipanin so hent, at hon eisini vísir skipið við navni, kallibókstavum, kós, ferð, hvat slag av skipi talan er um o.s.fr, sigur Jan Egholm.

Sostatt veitir hendan skipanin nógv fleiri upplýsingar um skipaferðsluna, enn tað fáast við vanligum radara.

Samstundis eru fleiri støðir settar upp á landið í Føroyum, sum "lurta" eftir AIS-skipanini.

- Sostatt fæst fult yvirlit yvir ferðsluna hjá øllum skipum, sum hava hesa skipanina og tað røkkur einar 80-100 fjórðingar út.

Ì hesum sambandi hevur Vikmar gjørt eina internettænastu, sum reiðari, havnamyndugleikar eru sera væl nøgd við.

- Er eitt skip á veg inn, ber altíð til at fara inn á skipanina at siggja, hvussu langt skipið er komið og tað lættir munandi um alla tilrættislegging í hesum sambandi, fyri at nevna eitt dømi, sigur Jan Egholm.

Hetta er ein skipan, sum Vikmar havt í eina tíð.

- Men seinastu tíðina er áhugin fyri skipanini vaksin munandi, serliga tí, at fleiri og fleiri skip fáa hesa útgerðina umborð, sigur Jan Egholm.

Umframt hesi bæði tilboðini, hevur Vikmar eisini nógv annað at vísa fram á Fish Fair.



Sosialurin